# Miðvikan

Müllersøgan:

# Poul Müller hevði fyrstu telefon í Grønlandi

**Í umrøðuni av Müllerættini í Havn koma vit nú til tann seinasta, nevniliga Poul, triðja sonin hjá Marin Kristinu og Hans Christopher Müller, sýslumann í Havn. Sum øll hini hevur hann sína serligu søgu, sum vit fara at hava í tveimum pørtum**

**11. partur**

Tað var Poul Müller, sum var upprunin til hesa greinarøð, sum var grundað á tey nógvu brøv, sum hann legði eftir seg. Tí er longu sagt nokk so nógv frá hansara søgu.

Hesi brøv eru tó flest øll slík, sum hann hevur fingið. Hann hevur eisini sent ein hóp av brøvum, men tey kenna vit sum so einki til Tí hevur myndin av Poul verið eitt sindur ófullfíggjað.

Men kortini ber til at geva eina nærri mynd av Poul. Í ár 2000 skrivaði Lars Dyrløv Madsen, lesandi við Roskilde Universitetscenter, eina ritgerð um menning av svartkalvaveiðu í Jakobshavn seinast í 1800 talinum, har Poul var undangongumaður.

Henda ritgerð viðgerð eisini Poul sum persón, og er henda fyrra greinin grundað á nevndu ritgerð.

### Gjørdist triði kolonistjórin í ættini

Poul var kolonistjóri í Jakobshavn/Ilulisat frá 1892 til 1901, tá ið hann doyði. Sum áður greitt frá, vóru beiggi hansara, Rasmus, og svágurin, Grønlands Johan, kolonistjórar í Grønlandi um somu tíð. Sostatt hevur ættin havt stóra ávirkan í Grønlandi seinast í 19. øld

Kolonistjórin var ovasti myndugleikin hjá kongaliga handlinum í koloniini. Hann hevði eisini ábyrgdini av øllum fólkum undir »dansk ret.«

Í Jakobshavn vóru umframt kolonistjórin og ein danskur assistentur níggju mannligir grønlendskir hjálparar. Hesir skuldu gera alt fyrifallandi arbeiði. Umframt var konufólk, sum hjálpti til heima við hús.

**Komandi partur**
Svartkalvi hevur havt stóran týdning fyri Grønland.
Her var Poul Müller ein undangongumaður

Arbeiðið hjá kolonistjóranum var nógv at fást við umsiting, eisini við skráseting av tí vinnuliga virkseminum.

### Poul fer til Grønlands

Poul var føddur í Havn 15. desember 1861, og hann varð doyptur í Havnar kirkju 23. mars 1862.

Poul fekk eitt gott prógv frá realskúlanum í Havn í 1877. Hann arbeiddi síðani tvey ár hjá fútanum í Havn, haðani hann fekk framúr gott ummæli.

Í 1881 fekk Poul starv hjá kongaliga grønlendska handlinum í Keypmannahavn, og í 1883 varð hann sendur til Christianshaab at arbeiða hjá handlinum. Frá 1886-1888 hevði Poul farloyvi orsakað av eini oyrnasjúku, sum gjørdi, at hann líðandi gjørdist nærum púra deyvur.

Í 1891 kom Poul til Jakobshavn sum assistentur. Í 1892 gjørdist hann virkandi kolonistjóri, og árið eftir kom hann í fast starv.

Poul doyði 19. november 1901 av »bróstsjúku,« í veruleikanum tuberklum. Tað hjálpti ikki uppá sjúkuna, at hann ikki spardi seg sjálvan.

Poul varð jarðaður 24. november og fekk ein sermerktan gravstein, sum enn minnir um hann. Gravsteinurin ímyndar eitt træ.

### Áhugaður fyri alt, sum hevði við náttúru at gera

Sagt verður um Poul, at hann umframt sítt arbeiði sum kolonistjóri, eisini var áhugaður fyri frítíðarlívi í grønlendsku náttúruni. Hann fiskaði og fylgdi við í djóra- og fuglalívinum eins og beiggin Rasmus. Hesin áhugi kom eisini fram í teimum brøvum, hann fekk frá beiggjanum Hans Christian, sum fór til Amerika, ein áhugi teir vóru felags um.

Poul hevur eisini skrivað nokk so nógv niður av tí, sum hann eygleiddi í Grønlandi um fugl, kóp og fisk, og er hetta til skjals á Kongaliga Bókasavninum.

Eisini innsavnaði Poul fitt av fugli til at stappa út, ta tíð hann var í Grønlandi. Poul fiskaði eisini



*Poul var ein av teimum trimum av Mulleræ̈ttini, sum var kolonistjóri í Grønlandi seinast í 19. øld*

síl. Hann dugdi væl at koyra við hundum, og hann hevði 40 hundar, sum var roknað fyri at vera nógv tá í tíðini.

### Fyrstur við telefon í Grønlandi

Poul var frammarlaga við nútímans tøkni. Hann hevði eina telefonskipan í kolonistjórahúsinum, og hevði hann sostatt telefonsamband við bygningarnar hjá handlinum. Hetta var helst fyrsta telefonskipan í Grønlandi. Tað er merkisvert, hvussu skjótur hann hevur verið, tá hugsað verður um, at Bell uppfann telefonina í 1881. Telefonin kom jú ikki í Føroyum fyrr enn í 1906.

Poul var eisini íðin fotografur, og hansara myndir eru til skjals á søvnum í Grønlandi og Danmark. Myndirnar hjá Poul Müller eru, um ikki tær elstu, so millum tær eldru í hesum søvnum. Hetta áhugamál hevði hann til felags við pápan.

### Kundi vera ov stívrendur

Poul hevði eitt stórt djórahald i, og hetta gav honum eisini trupulleikar í lokala samfelagnum.

Hetta elvdi eisini til fleiri stríðsmál. Eitt mál av hesum slag var, tá ið Poul kravdi endurgjald, tí hundar vóru lagstir á seyðin hjá honum á eini oyggj. Hundarnir høvdu dripið fleiri seyðir.

Men hesum fekk Poul einki burtur úr. Hann skuldi havt vitað, at á fjøru, og tá ísur var, sluppu hundarnir lættliga út á oynna.

Hetta dámdi ikki Poul, og sagt verður, at hann var í øðini og gav ilt av sær um hesa avgerð.

Hetta hevur ikki verið væl upptikið millum íbúgvarnar, har hundahald var grundarlagið fyri samfelagnum, og har illsinni vanliga ikki varð góðkent.

### Djór og plantur

Hvussu fjølbroyttur Poul var, sást í øllum djórunum hann hevði. Tað var seyður, høsn, dúgvur, villgæs, kaninir, geitir og svín. Tað hevur kravt eitt stórt innhegnað øki at hava pláss til øll hesi djórini og støðugt at skula verja tey móti hundunum. Tað má eisini hava verið eitt stórt arbeiði at útvega føður so norðarlaga á knøttinum. Men hetta tyktist kortini at rigga væl.

Eisini dyrkaði Poul plantur, blómur og grønmeti. Dømi um hetta eru persilla, karsa, salat, blomkál, røtur, kál og blómur sum rósir, nelikar o.s.fr.

### Óvinur við prestar, men vinur við læknar

Eina ferð um mánaðin var donsk gudstænasta í kirkjuni. Men her møtti Poul ongantíð upp. Hetta var ikki væl upptikið í einum kristnum samfelagi. Men serliga var hetta illa upptikið av danska prestinum, at ikki allir teir fáu dansktalandi møttu upp. Men tað skilst eisini á brævaskiftinum hjá Poul, at hann hevur ikki verið ov væl í øgn við donsku prestarnar. Teir hava kanska heldur ikki altíð verið av Guds bestu børnum. Eisini kundu teir sjálvir vera ringastir móti sínum egnu.

Økislæknin Bentzen skrivar í síni dagbók, hvussu hann upplivdi Poul Müller í 1899:

»Lige for broen er et gammeldags pynteligt hus (kolonibestyrerhuset), rensdyrgevir over døren, stort beslag, hvidmalede vindueskarmer. Ned derfra kommer en lille spinkel mand, dansk klædt, med kasket på hovedet, brun jakke, lange kamikker. Han kommer langsomt og roligt, lige som lidt nølende og lidt forlegent, som om han på en måde er forskræmt og dog overlegen. Men jeg kan ikke give noget billede, der kan forklare det